## Biskupur skal av landinum

Myndugleikarnir í Argentina hava givið tí umstrídda katólska biskupinum Richard Williamson boð um at fara va landinum innan 10 dagar. Fer hann ikki við góðum, verður hann fluttur av landinum. Richard Williamson er ein sera umstríddur maður, tí hann heldur uppá, at í mesta lagi 300.000 jødar vórðu fyribeindir í týningarlegunum hjá týsku nazistunum og ikki seks milliónir, sum søgufrøðingar siga. Vatikanið hevur biðið biskupin broyta hugsan, men hann hevur biðið um tíð til at hugsa seg um.



## Obama í Kanada

Amerikanski forsetin, Barrack Obama, avsannaði í gjár, at hann skal hava lagt trýst á kanadisku stj´ronina fyri at fáa hana at senda fleiri hermenn til Afghanistan. Obama, sum er á vitjan í Kanada, segði tvørturímóti, at hann hevði takkað kanadisku stjórnini og forsætisráðharranum, Stephen Harper, fyri kanadisku luttøkuna í Afghanistan. Vitjanin í Kanada er fyrsta uttanlandsferðin hjá Obama, síðani hann tók við sum forseti. Á einum fundi samdust Obama og Harper um, at USA og Kanada skulu samstarva á orkuøkinum fyri at tálma veðurlagsbroytingunum.

# Halda fast við traditiónirnar

**Meðan tíðin tykist fara við flestu traditiónunum, halda dalbingar fast við føstulávints mánadag**

FØSTULÁVINT

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Dalur er eftirhondini millum fáu bygdirnar í Føroyum, sum enn halda fast við traditiónina at sláa tunnu føstulávints mánadag. So at siga alla aðra staðni er hetta flutt til leygardag ella enntá fríggjadag undan føstulávint.

- Her sláa vit enn tunnu mánadag. Byrjað verður klokkan 15, tá børnini sláa tunnu. Síðani verður so farið inn í Eiriksgarð, har tey sláa pottar ella kasta bóltar eftir borðiskum, alt eftir nú hvat liggur fyri hondini, greiðir Helga Poulsen frá.

Seinni – einaferð um 17-tíðina – fara tey vaksnu so at sláa tunnu, og tað eru bæði menn og kvinnur, sum halda seg framat.

Vanligt er, at kattakongurin verður borin heim til hús, har hann bjóða eitthvørt leskiligt.

Ikki altíð gongst sum ætlað, og einaferð føstulávint var, og tunna sum vanligt varð sligin, varð tað eitt konufólk, sum gjørdist kattakongur. Traditiónin skuldu jú fylgjast, og hendan konan mátti bjóða heim.

Men ólukkutíð, so visti hon einki, hvat maðurin goymdi tað váta slagið, og mannfólkið í bygdini vildi ikki út aftur, fyrr enn teir høvdu fingið upp í nevið.

Har var einki annað at gera hjá konuni, enn at ringja umborð til mannin, sum var til skips, at vita, hvar hann hevði brennivínsgoymsluna. Hetta var í teirri tíðini, tá ongar fartelefonir ella so frægt sum ein VHF'ur var til taks, so alt tosið fór fram um Tórshavnar Radio, sum hvørt mansbarn í Føroyum hoyrdi og lurtaði eftir.

Hóast søgan ikki sigur nakað um tað, so mátti hesin maðurin uttan iva finna sær eina nýggja goymslu til tað váta slagið.

### Dansa føstuna inn

- Konufólkið í bygdini matger til kvøldið, onkur syrgir fyri smyrjibreyði, onkur annar fyri køkum soleiðis, at øll koma við sínum. So hittast øll, børn og vaksin, at hugsa sær við mati og drekka, tá tunnusláingin og blíðskapurin hjá kattakonginum er fingin frá hondini, sigur Helga Poulsen.

- Um 20-tíðina verður so farið upp á gólv at dansa føstuna inn, og hildið verður á nakað út á kvøldið, siga tær báðar Helga Poulsen og Sannelena Nolsøe, sum riggaðu til mikudagin, tá Sosialurin vitjaði.

Hildið verður kortini ikki fast við allar síður av traditiónunum.

- Fyrr var tað vanligt, at dalbingar fóru mannsterkir til Skálavíkar at dansa føstulávints mánakvøld, men soleiðis er ikki longur. Tann parturin av traditiónini er fallin burtur. Og nú sláa sandingar fyri fyrstu ferð tunnu leygardag, so nú ber heldur ikki til hjá ungfólkinum at fara hagar, tá liðugt er í Dali, siga tær báðar.

So mánakvøldið verður aftur í ár tunnusláttur í Dali, ein av fáu – og kanska einastu – bygdunum í Føroyum. Har halda tey nevniliga fast við traditiónirnar.



*Helga Poulsen og Sannelena Nolsøe uttan fyri Eiriksgarði í Dali, sum er bygdahúsið í bygdini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Stórur áhugi fyri ídnaðarøki

**Fyri nøkrum árum síðani legði Sands Kommuna eitt rímiliga stórt øki av til ídnaðarøki, og nú er hetta sundurmatrikulerað. Stórur áhugi er fyri økinum, og fimm grundstykki eru seld**

ÍDNAÐUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Suðuri omanvert havnalagið legði Sands Kommuna fyri nøkrum árum síðani eitt øki av til ídnaðarøki. Lítið varð tó gjørt við hetta øki til fyri stuttari tíð síðani, tá kommunan fór undir at sundurmatrikulera økið. Og nú er rættilig gongd komin á.

- Vit hava selt fimm av grundstykkjunum, og fýra teirra eru liðugt frámatrikulerað, meðan tað fimta er í teirri prosessini, sigur Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi.

Talan er um fyritøkur á Sandi, sum vilja hava størri rásarúmd, so talan er ikki um nýtt virksemi, sum fer í gongd.

- Vit hava býtt grundøkini upp í ymsar støddir, frá 1500 fermetrum upp til 4000 fermetrar. Haraftrat hava vit valt at selja grundøkini ógvuliga bíliga, bert 15 krónur fermeturin, sigur Páll á Reynatúgvu.

Tó er tað so, at fyritøkurnar sjálvar mugu grava oman av og planera, men ein stór grótrúgva liggur tætt við ídnaðarøkið, og har kunnu fyritøkurnar fáa grót ókeypis til planeringina. So treytirnar eru so lagaligar, sum tær kunnu vera.



*Tað er her oman fyri havnalagið á Sandi, at Sands Kommuna nú hevur sundurmatrikulerað ídnaðarøkið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Áhugi aðrastaðni

Borgarstjórin á Sandi sigur, at byggisamtyktin fyri ídnaðarøkið er ógvuliga breitt orðað, og loyvir øllum endamálum innan handil og vinnu, tó ikki fiskivinnu.

Sum nevnt eru allar fimm fyritøkurnar, sum higartil hava søkt og fingið byggiloyvi á ídnaðarøkinum, av Sandoynni, men áhugi hevur eisini verið fyri økinum uttan fyri oynna.

- Serliga tá tunnilsprátið gekk upp á tað harðasta, fingu vit fleiri fyrispurningar frá fyritøkum aðrastaðni frá um grundøki, men tað bleiv við fyrispurningarnar. Tað er jú langt frá optimal viðurskifti, at vit framvegis skulu noyðast at líta á ferju at sleppa til og frá oynni, sigur Páll á Reynatúgvu.

Fyritøkurnar, sum keypa og fáa byggiloyvi á ídnaðarøkinum, fáa eina freist upp á tvey ár til byggingin skal byrja.